Lær hann fram um alt at hugsa sjálvur

TÁ talað verður um tíðina, verður ofta borið saman við hitt streymandi vatnið. Betur mynd fæst ikki enn áin, sum smúgvandi sær, í støðum fossandi, dunandi, so aftur rennandi møk, altíð á ferð móti tí endaleysa havinum.

Soleiðis er tíðin, hitt snikjandi heystið, tann harðbalni veturin, tað sprettandi várið og mjúka summarið.

ENDALEYS tóktist hin myrka tíðin, veturin vildi ikki sleppa sínum ísakalda takið; ómegd kundi stundum snikja seg inn og køva lívshugin; men so kom várið við hækkandi sól á himnaboganum, so við og við mátti veturin lúta, sólin bræddi kavan og fløvaði frædið, sum fjalt hevði ligið undir fonnini, sovandi vetrarsvøvn; hon reivaði og vakti til lívs, yndisligar blómur sprottu úr moldum og friðkaðu foldina. Landið klæddist í skreytbúna, búgvi at taka móti teim um veingjaðu summargestunum.

Tær angandi blómurnar, hin syngjandi fuglurin, alt vakurt og reint, sum eygað sær og oyrað nemur, er ein sólstrála, sum gevur megi til tað hulda frædið í mannabarminum; kveikir liv í og fær at spretta; tað er lívsgleðin, ótemjandi so leikandi løtt, fyri framman er sól og summar, eingin skíming og eingir skuggar.

ÚTI við Toftavatn hevur verið hildin fólkafundur síðan Skálafjarðarstevna var á fyrsta sinni, í ár bleiv annarleiðis; onkur gevur mær rætt tá eg sigi at gamla fundarstaðið var tað betra, tí ein slíkan dag støðga vit á og sammeta tað undanfarna við tað sum er, og hvar koma vit nærri í samband við fortíðina enn har, allastaðni kring vatnið er hagin merktur av mannahond, merktur, men ikki skemdur, tí vandaliga gingu teir um.

Haðani fingu teir torvið, hin lívgandi hitan móti vetrakuldanum; fólk kom langvegis frá, her var liv í haganum, menn, kvinnur og børn. Sterkir armar skóru, treystir bóru teir burtur, turkaðu og fingu í krógv; kneykrandi torvleypin troddu teir trúgvir gotuna, fótabreitt svarðloysi heim til húsa.

Á SJÓGV og landi var kappingin sermerkið teirra í strembanini at lívbjarga sær. Fyri okkum sum hava lyndi at meta løn og virðir í peningi tykist úrtøkan av øllum strevi teirra at hava verið lítil. Teir mettu ørðvísi, áttu arbeiðsgleði: »at royna mína megi mín ítarsta mátt, tað nørir mína gleði ger sinnið so kátt.«

UNGA ættin arvaði avrekshugin, vit finna hann í egningarskúrinum, við flekiborðið, í dagliga virki føroyingsins á sjógv og landi kemur hann til sójndar; og nú ræsurnar eru rúmkaðar, so talan er um avlopstið og frítíð, situr ikki ungdómurin sovandi, nei við stældum vilja leitar hann á vøllin til venjingar ella baksandi í bátinum, skræðandi skeiðina fram so at fannhvítur froyur stendur frá.

Í DAG býður ungdómurin okkum at vera við, sveinar og sprund vilja sína okkum fimleik; kynstir og snildur sínar. Vit koma at síggja hann ið sigraði fáa steypin, vit fegnast og øvunda, men er tað ikki so, at uppaftur meira øvunda vit tí

Armar orna andlit rodna
spennast sterkar spengur
homlur togna árar bogna
skúmið dreiv um rengur.

KAPPINGIN og kappróðurin er ein varðveitan av fedranna anda, og tí verða vit hugtiknir og leggja fegnir oyra til tá teir gomlu siga frá hørðum grindaróðri ,ella tá teir strembandi fyri at vinna upp land sótu leinkjaðir til árina tíma eftir tíma, alsamt rógvandi móti vindi og streymi.

Jú róðurin var og er ein partur av føroyinginum, men teir gomlu kendu sína styrki og teir kendu sína avmakt, og tað er nakað sum nógv meira enn alt annað ber og hevur borið fólk okkara uppi gjøgnum tungar øldir, sum var óloysiliga knýtt at hvørjari ferð á sjógv ella landi, nakað, sum fjallvit, um vit lata tað, sum longu er deyðamerkt blenda okkum og skugga fyri sólini.

ENDALEYS TÓKTIST HIN MYRKA TÍÐIN, VETURIN VILDI IKKI SLEPPA SÍNUM ÍSAKALDA TAKIÐ, Ó-MEGD KUNDI STUNDUM SNÍKJA SEG INN OG KØVA LÍVSHUGIN; MEN SO KOM VÁRIÐ VIÐ HÆKKANDI SÓL Á HIMNABOGANUM, SO VIÐ OG VIÐ MÁTTI VETURIN LÚTA, SÓLIN BRÆDDI KAVAN OG FLØVAÐI FRÆÐIÐ, SUM FJALT HEVÐI LIGIÐ UNDIR FONNINI, SOVANDI VETRARSVØVN ...

Á SKÁLAFJAÐARSTEVNUNI SUNNUDAGIN 19. JUNI HELT PETUR ELI MIKKELSEN HESA RØÐU

UNGDÓMURIN hin ævit annarleiðis og altíð umtalaði. Komast vit við tá vit lesa tær øldargomlu reglurnar sum stúrandi vóru festar á blað, hann ið ritaði følir seg fullvísan um, at evsti dagur er í hondum ,tí ungdómurin og børn eru so ólátaði; lýða ikki foreldur síni, atburðurin er nógv verri enn nakrantíð áður.

Vit kenna slíkar málberingar og vit vildu harmast um virðingin fyri teimum gomlu, sum hevur sitið so føst í føroyinginum, var drigin í skarnið.

Men geva vit honum rætt, at ungdómurin er vorðin verri, mundi hann ikki hava gloymt egnu ungdómsbrek síni?

Er ikki dómurin mangan ov bonskur, ið lísin verður yvir tað uppvaksandi ættarliðið. Stendst ikki mangan tað vit taka sum gott prógv um ein spiltan ungdóm einans av lívskæti, og manglandi royndum. Hann kundi ikki trúgva at tað, sum stóð í blómuliki var ein nota við eitrandi broddum, av stoytunum kendi hann sviðan, lærdi av royndunum og bleiv gamal; alt meðan nýggjar slektir tóku við. Hetta verður ikki sagt fyri at doyva og rura í svøvn; men fyri at minna á, at trúgvin til framtíðina hvílir í ungdóminum, at lætt er at síggja ruskið og at ábyrgdin hvílir tung á herðunum.

Tann bjartskygdi, virkisfúsi ungdómurin er lívsnervin í samfelagnum og vársól fyri sinnið, troytta hann ikki við køvandi ábreiðslum, men rættleið hann, stuðla hann og ver við, tá hann býður.

LÆR hann fram um alt at hugsa sjálvur, ikki at lata seg tøla til blint at fylgja nøkrum slóðara; hann verið sær aldri so menskur, hugsar ikki so hátt, sær ikki so gløgt og droymir ikki so langt, at bundið av tíðini er alt, ið myndaðist av manni, hóast dygdir merkt av lýtum og brekum; ikki gerast sum andleysa sprekið, ið skolar undan vindi og streymi, fyri loksins í sugguni malandi miðleysan runddans millum rotnandi rekar.

Men at varveita virðini, vraka villurnar og gera arvin ríkari.

Ver honum fyridømið, tað sum fedrarnir dugdu so meistarliga, tá teir funnust til skemtunar, at leggja gerandisdagin frá sær, tveita alt yvir borð, sum kundi níva og seta skør í gleðina.

EIN slíkan dag eru heilsaninar heitar og lógvatøkini føst. Slekt og kenningar hittast, vinir finna hvønn annan, gomul hugnalig minnir drigin fram og nýggj vinarbond knýtt.

VIÐ sannari lívsgleði, hugnandi okkum saman við ungdóminum, fagnandi summarinum, lívinum; tí velduga skapanarverkinum, varveitandi arvin; tá kunna vit halda stevnu í tí treystí, at hon verður av Drottinum signað.



... rógvandi so rokið stendur um æsing inn ...

Úr býráðnum...

(Framhald frá 1. síðu)

Drúgt orðaskifti var um hetta mál.

M.a. vildi J. P. Heneriksen hava at vita um tað peningaliga og um ognarviðurskiftini vóru í ordan. Eisini vildi hann hava tíðarfreist settað fyri arbeiðini.

Býráðsformaðurin svaraði at ongantíð hevði likviteturin verið so góður hjá Havnar kommunu sum í dag. Petur í Gong upplýsti, at alt var í lagi at byrja. Til spurningin frá J. P. Henriksen hvussu tilboðini lógu sammett við útrokningarnar hjá teknisku leiðsluni, varð svarað, at tey 4 lógu nakað lægri. Flemming í Gong fekk arbeiðið við tíðarfreist, 1. parturin liðugur 30. nov. í ár, seinni parturin 30. sept. 1967.

FRÁ BÝARPLANSNEVNDINI

Heili 21 tilráðingar vóru. Hesi fingu byggiloyvi:

Elsa Horn, Hagbard Dalfoss, Harald Gray, Arne Petersen, Kim Lützen, Bjarni Samuelsen, Jana Niclasen, Eli Petersen, Finnbjørn Dam, Eli Mortensen og Hjørmund Magnussen. Frá Magnusi Tórsheim var umsókn um at byggja raðhús við Velbastaðvegin, ikki játtað, tí samtykt er at byggja einfamiljuhús her. Heri Mohr og Ditlev Olsen fingu byggiloyvi til bilskúrar og Telefonverkið fekk loyvi til ein tilbygning. Umsókn frá matrikulstovuni um sundurbýti av matr. nr. 1001 t (Velbastaðvegurin) varð játtað og somuleiðis varð samtykt at søkja landsstýrið um dispensatión frá býarrætlanini viðv. byggjan av ítróttarhøllini á Nabb. Kjartan Johansen søkti um loyvi at byggja uppaftur húsini, sum brendu (Lucas Debesargøtu), men málið var beint aftur í nevnd, tí byggilinjan har í gøtuni er ikki heilt greið. Til fyrispurningin frá Ellingsgaard mat stovu um at byggja aftrat, varð svarað, at byggjast kundi suður og norðureftir. Bileftirlitið fekk byggiloyvi á økinum hjá polítistøðini og mál viðv. tráðum við Oyggjarvegin varð beint í kassanaevndina.

Brøv frá Leivi Lützen fyri Hans Jákup Johannesen viðv. byggiloyvi varð beint í býarplánsnevndina.

Mál fyri læstum hurðum.

j. h.

HESS-O-DAN
den varme-rigtige oliekamin



- dejlig nem varme
- god økonomi
- indbygget tank...

Pf. Valdemar Lützen
Tórshavn — tlf. 1020